# Reglugerð fyri egna mynd á gjaldskort

Fyri at fáa gjaldskort við egnari mynd, eru nakrar treytir viðvíkjandi upphavsrætti, vørumerkjum o.ø., ið skulu haldast.

Búmerkið hjá Suðuroyar Sparikassa skal týðiliga síggjast á kortinum. Sparikassin tilskilar sær rættin til at avvísa bíleggingina um búmerkið ikki sæst týðiligt.

Myndin skal vera í jpeg, tiff ella png formati. Og støddin á myndini má í minsta lagi vera 1020 x 640 pixels og í mesta lagi 3 MB.

Niðanfyri eru dømir um myndir og tekst, ið ikki verða góðtikin:

- Nøvn, orð, slagorð ella ímyndir, ið beina tankar á virkir, feløg ella vørumerkir. T.d. lýsingarmyndir av bilum, motorsúkklum o.ø.
- Búmerki hjá fyritøkum, vørumerkir, tekstir ella ímyndir, ið t.d. vísa til ítróttafeløg, felagsskapir ella vørumerkir.
- Myndir, ið eru vardar av upphavsrætti.
- Myndir av persónum krevst loyvi frá viðkomandi. Suðuroyar Sparikassi tilskilar sær rætt til ein hvørja tíð at síggja hetta loyvi.
- Figurar úr teknirøðum og skemtitekningum.
- Telefonnummur, t-postur ella heimasíður.
- Pengaseðlar.
- Myndir, ið kunnu órógva ella blandast við trygdarmerkið á kortinum.
- Politisk útsøgn, ímyndir, felagsskapir ella flokkar.
- Útsøgn, ímyndir, felagsskapir ella persónar, ið eru átrúnaðarlig, rasistik ella gera mannamun.
- Harðskapur, vápn og stríðsítrótt.
- Gudsspottan.
- Ágangandi ella kynslig evni, bæði listarligt og ónæramyndir.
- Metal botnlit.
- Olympisk búmerkir og líknandi.
- Myndir, ið fáa gjaldskortið at líkjast einum samleikaprógvi.

Suðuroyar Sparikassi tilskilar sær rætt til at avgera, um myndin verður góðkend og hevur ikki skyldu til at grundgeva eina møguliga noktan.

Um gjaldskort við einari noktari mynd verður bílagt fleiri ferðir, kann Suðuroyar Sparikassi útihýsa viðkomandi frá at brúka hesa bílegginarskipan.

SUÐUROYAR
SPARIKASSI